## VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Lot til andøvsgul av norði, seinni lot av ymsum ættum. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 1 og 4 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 1 og 4 stig. Um kvøldið veksur hann vindin til hvassan vind og sum frálíður avfall, partvís vátakavi. Hitin kemur upp í 4 til 7 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av eystri og landnyrðingi og stundum regn. Hitin millum 4 og 7 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Strúkur í vindi upp í hvassan vind av landnyrðingi og norði, mánadagin møguliga skrið av norði. Ælaveður, partvís kavi og hitin millum frostmarkið og 4 stig.



*Danska verjuskipið lá fyrrapartin í gjár og skjeyt salut fyri Ingrid Drotning ið andaðist týsdagin*

# Drotning Ingrid farin

KONGSHÚSIÐ
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Týsdagin andaðist hennara hátygn drotning Ingrid á Fredensborg 90 ára gomul. Drotningin hevur verið rættuliga byrg og hóast hon hevur verið boygd av elli, so hevur hon javnan verið at sæð seinastu árini. Men í seinastu viku, tók heilsan rættuliga at bila og týsdagin viknaði hon burtur í einki og andaðist. Hon visti til sín tað seinasta.

Úr Føroyum hevur løgmaður, Anfinnur Kallsberg, vegna Føroya Fólk, sent hennara hátygn, Margretu drotning, samhugafjarrit, orðað bæði á føroyskum og á donskum. Fjarritið er soljóðandi: »Det færøske folk deltager i Deres Majestæts savn og sorg ved Dronning Ingrids bortgang. Vi mindes i taknemmelighed og respekt Dronning Ingrids gerning for det færøske folk. »(undirskrivað Anfinnur Kallsberg løgmaður, red.)

Drotningin var savnandi persónurin í danska kongshúsinum, eisini eftir at hansara hátygn Fríðrikur kongur doyði fyrst í sjeytiárunum. Hon hevði stóran kærleika til familjuna og hevði stóran týdning fyri Fríðrik krúnprins, serliga tá ið hann var lítil og mamman var nógv upptikin av at umboða Danmark.

Drotning Ingrid hevur fleiri ferðir vitjað í Føroyum.

Drotningin fer til gravar í Roskilde dómkirkju komandi týsdag 14. november klokkan 13:50. og Føroyar verða helst umboðaðar av løgmanni.

Friður verði við minninum.



*Syrgjandi danir mintust Ingrid Drotning uttanfyri Fredensborg*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 0 |
| Nuuk | ÷1 |
| Qaqortoq | ÷3 |
| Ammassalik | 1 |
| Saint John's | - |
| Halifax | - |
| Reykjavík | ÷3 |
| Seyðisfjørður | ÷1 |
| Tórshavn | 5 |
| Lerwick | 8 |
| Aberdeen | 6 |
| London | 10 |
| Tromsø | 1 |
| Bergen | 9 |
| Oslo | - |
| Stokkhólm | 9 |
| Keypmannah. | 9 |
| Helsinki | 6 |
| Moskva | 0 |
| Berlin | 10 |
| Warzawa | 11 |
| Kiev | 6 |
| Bukarest | 12 |
| Paris | 9 |
| Madrid | 9 |
| Róm | 17 |
| Malorca | 16 |
| Athen | 24 |
| Malta | - |
| Tunis | 22 |
| Beijing | 0 |
| New Dehli | 32 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | - |
| New York | 12 |
| Miami | 26 |
| Los Angeles | 19 |
| Meksikobýur | 23 |
| Panama | 31 |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | - |
| Buenos Aires | 18 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 977 hPa. yvir Norðsjónum grynnist, meðan ein hátrýstryggur yvir Íslandi kemur móti Føroyum.




Ein lítil hátrýstryggur skamt vestan fyri Føroyar fer eystureftir, og lágtrýstið í útsynning úr Íslandi fer spakuliga í landsynning og dýpist.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 07/11 kl. 06[00]-08/11 kl. 06 [00]. Hitin í gjár: 4,2°
Minsti hiti máldur í nov.: ÷7,2° Mesti hiti máldur í nov.: 12,2°

### AVFALL




Avfallið: 0,6 mm - mált frá 07/11 kl. 06[00]- 08/11 kl. 06[00]
Avfallið higartil í november: 39,2 mm

### VESTFALLSKYRRINDI

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 8. nov. | 03:27 | 15:54 | 02:27 | 14:54 | 02:42 | 15:09 | 05:27 | 17:54 | 06:27 | 18:54 | 01:42 | 14:09 | 00:42 | 13:09 | 03:42 | 16:09 | 04:42 | 17:09 | 03:12 | 15:39 | 04:27 | 16:54 |
| 9. nov. | 04:19 | 16:44 | 03:19 | 15:44 | 03:34 | 15:59 | 06:19 | 18:44 | 07:19 | 19:44 | 02:34 | 14:59 | 01:34 | 13:59 | 04:34 | 16:59 | 05:34 | 17:59 | 04:04 | 16:29 | 05:19 | 17:44 |
| 10. nov. | 05:05 | 17:27 | 04:05 | 16:27 | 04:20 | 16:42 | 07:05 | 19:27 | 08:05 | 20:27 | 03:20 | 15:42 | 02:20 | 14:42 | 05:20 | 17:42 | 06:20 | 18:42 | 04:50 | 17:12 | 06:05 | 18:27 |
| 11. nov. | 05:48 | 18:08 | 04:48 | 17:08 | 05:03 | 17:23 | 07:48 | 20:08 | 08:48 | 21:08 | 04:03 | 16:23 | 03:03 | 15:23 | 06:03 | 18:23 | 07:03 | 19:23 | 05:33 | 17:53 | 06:48 | 19:08 |

3. nov.: Mánin longst frá jørðini
4. nov.: Fyrra kvarter
11. nov.: Fullmáni

Kelda. Skipalistin 2000

Flog-ferðir
ring 345900

Sera bíligt at LEIGA SJÓNVARP
Úr 240,- og niðureftir
EINKI DEPOSITUM
Allar std. 20-26"
Vit hava eisini video
RADIO VERKSTAÐIÐ
V/ Guttorm Mortensen
Lýðarsvegur 15 • Havn
Tlf. 319544

Original bosal Útstoyt



ES
p/f Esmar Simonsen
Kambsdalur
FR-530 Fuglafjørður
Tlf. 444405
Fax444629

BILLUTIR
ÚTVEGAST TIL FLEST ALLAR BILAR
F.A. BILLUTIR
tlf. 421605 fax 421666

www.sosialurin.fo